Álit

í

løgtingsmáli nr. 48/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt (Javnseting av øðrum ansingarloysnum við kommunalu ansingarstovnarnar)

Rósa Tyril Gaardlykke, tingkvinna, hevur lagt málið fram 13. november 2025, og eftir 1. viðgerð 18. november 2025 er tað beint Mentanarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 26. november, og 3. og 4. desember 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Javnstøðunevndina, Føroya Pedagogfelag, Vinnuhúsið, Kommunufelagið, Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar, landsstýriskvinnuna í almanna- og heilsumálum, Margit Stórá, og landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóna Nolsøe Joensen, saman við ávikavist Gigni og Sernámi.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Karlot Hergeirsson, Jóhannis Joensen, Uni Holm Johannesen, Erling Eidesgaard og Liljan Weihe) hevur hesar viðmerkingar:

Tey flestu tykjast vera á einum máli um, at tað í størri mun eigur at vera møguligt hjá familjum, at skipa sín gerandisdag eftir egnum tørvi og ynskjum. Serliga, tá ið tað ræður um, at smábørn og foreldur eru saman og heima sum longst.

Tey flestu eru hinvegin ikki á einum máli um, hvussu hetta skal skipast frá almennari síðu, og hvør leistur er frægast.

Skipanin, sum vit brúka til at skipa barnsburðarfarloyvir, er barsilsskipanin, ið tey flestu eru glað fyri, og sum yvirskipað riggar heilt væl.

Hendan samgongan, eins og tær undanfarnu, hevur støðugt arbeitt við at bøta um barsilsskipanina. Millum annað við so líðandi at leingja barsilstíðarskeiðið upp í eitt ár, og har er komið á mál.

Hendan samgongan setti sær fyri at halda fram at betra barsilsskipanina, og tí legði hon í mars í fjør uppskot fram um at hækka mánaðarliga útgjaldshámarkið frá 25.000 kr. upp í 30.000 kr. Eisini vórðu gjørdar broytingar í útrokningargrundarlagnum, soleiðis at lestrarstuðul taldi við sum útrokningargrundalag – hetta fyri at lesandi, sum fóru í barsil, ikki duttu niður ímillum. Uppskotið bleiv samtykt í mai í fjør.

Hoyringarnar í nevndini hava givið eina ábending um, at tað er fyri tað mesta gagnligt, at børn eru heima til í minsta lagi 1 ára aldur, í fleiri førum til 1½ ár og í summum førum upp í 2 ára aldur.

Samstundis hava hoyringarnar givið, eins og kanning og gransking uttanlands hevur víst, sterkar ábendingar um, at um børn verða ansað heima, so kann hetta hava neiliga ávirkan á sosiala og kognitiva førleikan hjá børnum. Hetta sigur millum annað ein finsk kanning.

Henda finska kanningin vísir á, at børn sum hava verið ansað heima, eisini eru yvir umboðað í hagtølum fyri ungdómskriminalitet. Kanningin sigur tó ikki, at heimaansing er beinleiðis orsøk, men rekur upp undir, at tað veldst um hvørjar familjur, sum velja at ansa sínum børnum heima.

Eisini er sannlíkt, at heimaansing av børnum kann hava neiliga ávirkan á javnstøðuna millum kynini. Vanliga er tað framvegis so, at tað oftast eru kvinnur, sum eru heima hjá børnum – bæði í barnsburðarfarloyvi, men eisini tá børn eru sjúk ella hava tørv á at vera heima av øðrum orsøkum. Hetta er viðvirkandi til, at tilknýtið hjá kvinnum til arbeiðsmarknaðin versnar, lønin minkar, starvsmøguleikar gerast verri og/ella færri og elvir til munandi og varandi inntøkumiss hjá kvinnum. Í Finnlandi vísa eisini tøl, at tað er 80-90% kvinnur sum eru heima hjá børnunum, og at hesar kvinnur hava verri við at koma inn á arbeiðsmarknaðin aftaná.

Eitt ivamál, sum hetta uppskotið hevur við sær, er tað fíggjarliga. Hetta kom fram undir 1. viðgerð, og enn meira er tað komið til sjóndar undir hoyringunum.

Ivin er um, hvussu hetta fer at hanga fíggjarliga saman hjá kommunum og ansingarstovnum. Spurningurin er, um broytingin fer at draga fíggjarorku úr kommunalu ansingarskipanunum, sum flestu kommunur eru stoltar av, og sum tær lutvíst brúka til at draga fólk at búseta seg júst í teirra kommunu.

Vinnuhúsið og arbeiðgevarar eru heldur ikki trygg við, hvørja ávirkan hetta fer at hava á arbeiðsmegina og vinnutíttleikan. Teirra meting um uppskotið er fyri tað mesta neilig.

Arbeiðið hjá hesari samgonguni er ikki liðugt, tá tað kemur til at betra barsilsskipanina.

Landsstýrið miðar ímóti, at til várs kemur uppskot, sum skal gera barsilsskipanina smidligari. Nøkur hugskot, sum higartil hava verið umrødd, eru at gera tað møguligt hjá foreldrum at toyggja barsilstíðina móti einum lutfalsliga lægri mánaðarligum útgjaldi av barsilspeningi og møguleikin at flætta barsilstíðina, so at foreldur kunnu arbeiða hálva tíð summar vikur og mánaðir og harvið toyggja barsilstíðina.

Landstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum, Margit Stórá, hevur upplýst fyri nevndini, at tey eru nú í holt við at seta arbeiðsbólkin við umboðum frá arbeiðsgevarum og fakfeløgum; kommunurnar verða eisini tiknar við í tilgongdina at gera barsilsskipanina smidligari.

Tá hetta uppskotið skal geva møguleika at ansa børnum heima upp til skúlaaldur, samstundis sum kanningar og serkunnleikin bert metir tað vera gagnligt fyri børn upp til 1, 1½ og 2 ára aldur, er meirilutin samdur um at fella uppskotið og heldur bíða eftir uppskotinum frá landsstýrinum, sum vil gera eina smidligari barsilsskipan, har hon t.d. kann verða flættað og toygd.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Magnus Rasmussen og Bárður á Lakjuni) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið snýr seg um at geva kommununum eina heimild – eitt amboð – til betur at kunna skipa barnaansingarøkið, sum, um heimildin verður nýtt, fer at geva foreldrum ein nýggjan valmøguleika, tá tað snýr seg um fyrstu árini hjá barninum.

Tørvur er á, at foreldur kunnu fáa størri frælsi at skipa sín gerandisdag, og hetta uppskotið er ein liður í hesum at geva foreldrum størri frælsi og smidleika at leggja til rættis, hvussu barnaansing teirra skal skipast.

Uppskotið ásetur eina heimild til kommunurnar at rinda í mesta lagi 70% av rakstrarkostnaðinum fyri stovnspláss, sum barnið annars hevur í boði frá kommununi. Verður ískoyti latið til heimaansing, verður tað útgoldið sum A-inntøka til tann, sum ansar barninum, og verður tá eftirløn á 15% latin afturat ískoytinum. Heimaansing er í hesum førinum at skilja sum, at barnið verður ansað av foreldrum ella øðrum nærstandandi.

Eisini leggur uppskotið upp til, at hendan heimild loyvir heimaansing av børnum heilt upp til skúlaaldur.

Hoyringar í málinum hava víst, at tað hevur sera stóran týdning fyri barnið at vera hjá foreldrunum ta fyrstu tíðina og upp til uml. tvey ára aldur. Spurningurin um nær barnið kensluliga er til reiðar at fara heimanífrá hevur fylt nógv í hoyringunum, og tá var oftast lent á hesum tveimum árunum.

Um so er, at barnið og familjan fáa møguleikan at hava barnið heima, so vil tað siga, at foreldrini fáa meiri tíð saman við barni sínum og barnið fær tættari tilknýti til foreldrini. Tað er ein so ómetaliga týdningarmikil førningur víðari í lívinum – hjá barninum fyrst og fremst, men sanniliga eisini hjá foreldrunum og familjuni annars.

Ein annar fyrimunur við hesum møguleikanum er, at ein slík skipan kann verða sjúkufyribyrgjandi hjá barninum, tí flest øll børn eru ofta sjúk ta fyrstu tíðina á stovni.

Undir hoyringunum hevur verið ført fram, at ein vansi við einum uppskoti sum hesum kundi verið, at børn, ið hava serligan tørv, og børn, sum eru í vanda fyri at detta niðurímillum í skipanini, ikki nóg tíðliga og skjótt verða loftað. Hetta eru góðar og neyðugar grundgevingar, tí umráðandi er, at slík børn og slíkar familjur fáa ta hjálp, teimum tørvar, so skjótt, sum møguligt.

Stovnurin Gigni tekur sær longu av at vitja heimini frá tí, at barnið verður føtt, og til tað er 18 mánaðir. Eru viðurskifti í familjuni, sum Gigni metir ikki eru nøktandi, so heldur Gigni fram so leingi, sum stovnurin metir tørv vera á at vitja og ráðgeva familjuni. Minnilutin heldur tí, at vansin,

sum her verður nevndur er ikki at skilja sum tey fyrstu tvey/trý árini, men heldur tá børnini koma í barnagarðsaldur.

Hoyringarnar hava harafturat víst á viðurskifti, sum eru umráðandi fyri børn, tá tey eru komin í barnagarðsaldur, serliga hetta at koma saman við øðrum børnum og tann menning og sosialisering sum harvið fylgir. Hetta er sera stimbrandi og mennandi fyri øll børn.

Minnilutin er tí komin til ta niðurstøðu, at uppskotið er gott, men heldur, at tað gerst betri, um aldurin verður lækkaður frá skúlaaldri niður á barnagarðsaldur, t.v.s. upp til trý ára aldur. Gera vit tað, so heldur minnilutin, at hædd verður bæði tikin fyri barnsins tørvi, og at hetta eisini fyri familjuna hevði verið ein góð loysn, væl at merkja um kommunurnar – fleiri ella færri – taka av møguleikanum at loyva hesum.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1, nr. 4 verður “undir skúlaaldur” broytt til: “upp til trý ára aldur”.

Viðmerkingar
Ístaðin fyri at fevna um børn undir skúlaaldur sum í upprunauppskotinum, fer skipanin við hesi broyting einans at fevna um børn upp til trý ára aldur.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Mentanarnevndin, 11. desember 2025

Karlot Hergeirsson formaður	Jóhannis Joensen næstformaður	Uni Holm Johannesen
Erling Eidesgaard	Liljan Weihe	Magnus Rasmussen
	Bárður á Lakjuni	